## Størri arbeiðsloysi

Býarmyndugleikarnir í Reykjavík siga, at broytingarnar í íslendska búskapinum fara at hava stóra ávirkan á gongdina í høvuðsstaðnum og økinum kring býin. Millum annað verður fólkavøksturin í høvuðsstaðarøkinum væl minni enn væntað, og byggingin verður eisini væl minni enn fyrr mett. Myndugleikarnir vænta hinvegin, at arbeiðsloysið fer at veksa. Í fjør var tað 0,9 prosent. í ár ætlandi 1,8 prosent, og næsta ár verður tað umleið 3,5 prosent.



## Ølveitsla undir EM

Hóast regn og toruslåttur hevur ølsalgið hjá Carlsberg verið munandi størri enn roknað varð við undir EM í fótbólti. Í dag boðaði dóttirfelagið hjá Carlsberg, Feldschlösschen, frá einari øking í ølsalginum upp á 20% í mun til sama tíðarskeið í fjør. – Okkara mál fyri søluni undir Euro 2008 var ein øking upp á 10-15%, og tað hevur hildið, ikki minst takað verið 150.000 ølglaðum hollendarum. Somuleiðis hava lýsingarnar virkað væl, so fólk heldur hava drukkið Cerlsberg enn Heineken, segði Thomas Amstutz, stjóri í Feldschlösschen.

# Gevast eftir 76 ára tænastu

**Læraraparið Gunnvør og Hilmar Joensen, sum seinastu 23 árini hava virkað við Nólsoyar skúla, løgdu í gjár frá sær eftir ávikavist 39 og 37 árum sum lærarar**

STARVSLEIÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

»Hetta er ein sorgblíður dagur. Vit hesum haldi heiðra vit tykkum, sum hesi bæði lærarafólkini, ið tey síðstu mongu árini hava myndað skúlan í Nólsoy og blást lív í mentanarlívið í her úti við sjónleiki og tónleiki. Tykkara dagliga gongd hevur verið her niðan í skúlan og soleiðis týdningarmikla uppgávan at kveikja áhuga fyri læring og menning í ungar barnasálir. Tit hava nomið tykkum íbáslur í altjóða rákið og nýtt henda bygdaskúlan mitt úti í havinum sum eina verkætlan at nútímansgera føroyskan skúlaskap og harvið verið undangongufólk«.

Soleiðis byrjaði forkvinnan í skúlastýrinum, Joan Sørinardóttir, sína røðu á móttøkuni, sum var fyri teimum báðum, Gunnvør og Hilmar Joensen, í skúlanum í Nólsoy í gjár.

Og rætt er. Tey bæði hava myndað, ikki bara skúlan, men alt mentanarlívið í Nólsoy seinastu 23 árini.

Og tað var upprunaliga ikki ætlanin. Tey bæði røktu annars lærarastørv niðri í Danmark, men tá tey í 1984 vóru heima í Føroyum á vitjan, róði Hilmar hart upp undir, at tey skuldu flyta heim at verða lærarar, og tað skuldi vera úti í Nólsoy, um høvið beyðst.

- Eg játtaði at enda at vit kundu geva hesari roynd tvey ár, og so skuldu vit fara víðari, men tað endaði altso við 23 árum í Nólsoyar skúla, segði Gunnvør Joensen, fráfarandi skúlastjóri, í takkarrøðu síni.



*- Vanligt er, at býráðið handar fráfarandi skúlastjórum eina gávu. Í hesum førinum er tað so heppið, at tit bæði kunnu njóta hana, segði Heðin Mortensen, borgarstjóri, við Gunnvør og Hilmar Joensen*

*Mynd: Leo Poulsen*

### Nýskapan

Tey komu so til Nólsoyar í 1985, tá fyrstilærarin, sum tað tá æt, var vorðin sjúkur og harvið var starv leyst at søkja. Hilmar fekk starvið. Gunnvør var so ársvikarur fyrsta árið og tímalærari annað árið, áðrenn hon fekk fast starv.

Í 1996 fór táverandi skúlastjórin frá, og Gunnvør tók við.

»Bæði hava tit saman við skúlanum skipað fyri einastandandi tiltøkum – reinum show´um – sum føstulávintshaldinum og jólahaldinum, har tit hepnisliga hava dugað at inndrigið alla bygdina, og hugnemandi tiltøkum, sum morgurløtuna og próvhandanina hjá 9. flokki. Tá vit skoða rundan um okkum her, so er tað ein gamal skúli, sum vit síggja, men tit hava megnað at fylt henda skúla við anda og skapandi virksemi við næmingunum í miðdepli«, segði Joan Sørinardóttir í røðu síni.

Og satt er.

- Tað vóru mong, sum undraðust og kanska ilskaðust, tá vit byrjaðu at strika fakini á tímatalvuni, og fóru at arbeiða meiri í verkætlanum og temaum. Men í dag arbeiða allir skúlar á henda hátt, so tíðin hevur víst, at vit gjørdu rætt, segði Gunnvør Joensen.

Nólsoyar skúli var sostatt fyrsti skúli í landinum, sum byrjaði við verkætlanum og temadøgum og –vikum.

Serliga kreativur var skúlin tey árini, Sharon Weiss starvaðist sum lærari í Nólsoy, og vóru nógvir alternativir undirvísingarhættir nýttir.

Nú byrjar so ein nýggj tíð í Nólsoyar skúla við nýggjum skúlastjóra. Men sjálvt um tað uttan iva verður saknur í teimum í skúlanum, fara nólsoyingar annars framhaldandi at njóta gott av læraraparinum Gunnvør og Hilmar Joensen.

# Kapitalhækkan í Atlantic Biotechnology

**Á aðalfundinum í gjár varð samtykt at økja partapeningin í Sp/F Atlantic Biotechnology við upp til 9 milliónir krónur**

KAPITALHÆKKAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Atlantic Biotechnology fæst við at menna biotøkniligar proteinúrdráttir úr ráværu frá fiskaframleiðslu. Arbeitt hevur verið við ætlanini síðani 2005. Teir hava millum annað gjørt royndarframleiðslur og greiningar av proteinúrdráttum úr ymiskum fiskasløgum. Í løtuni verða fyrstu vørurnar marknaðarførdar.

Í fyrstu atløgu er ætlanin at menna úrdráttir til fóður, meðan tað í framtíðini verður arbeitt fram ímóti at virka og selja úrdráttir til mat- og heilivágsídnaðin.

Framleiðsla av biotøkniligum úrdráttum úr fiskaráværu er vinna í støðugari menning grundað á serkunnleika innan fleiri vitannarøki: biotøkni, membrantøki, marknaðarviðurskifti v.m. Stórur dentur er tí lagdur á at byggja upp neyðug netverk og samstarv til tílíka framleiðslu.

Verkætlanin stuðlar undir øktari gagnnýtslu av fiskatilfeinginum, og gevur harvið hugtakinum "burðardygg veiða" eitt betri vinnuligt grundarlag.

Avgerð um bygging av framleiðsluvirki verður eftir ætlan tikin innan 6 mánaðir, og framleiðsla kann tá væntast við ársbyrjan 2010.

Stovnarir felagsins eru Norcape Biotechnology AS (NO), Sp/F Innovent, Sp/F Mira og Framtaksgrunnur Føroya. Afturat hesum íleggjarum, hava nú eisini P/F Royndin og P/F SET gjørt innskot í felagið.

Eftir aðalfundin sita í nevnd felagsins: Sigurð í Jákupsstovu (formaður), Atli Rasmussen, Janet Fríða Johannesen, Alex Buvik og Eddy Georg Torp.

Stjóri í felagnum er Gestur Hovgaard.

*Gestur Hovgaard er stjóri í Atlantic Biotechnology*

